


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Demokrati



Val ✗

MARIA JOENSEN
Javnaðarflokkurin

Nú hava vit í longri tíð hoyrt nógv um Demokratia og arbeiði teirra. At hetta hevur borið ávøkst er eyðsæð, tí til komandi løgtingsval eru fleiri kvinnur enn nakrantíð uppstillaðar. Sjálvandi haldi eg tað vera sera gott, at kvinnurnar eru so væl umboðaðar, men demokrati snýr seg ikki bert um kyn. Eisini skal hugsast um, hvør er best egnaður, til at umboða teg og tíni áhugamál.

Skúlin, har børn okkara hava sína dagligu gongd, hevur brúk fyri betri undirvísingar tilfari. Alt ov lítið tilfar er til á føroyskum. Lærarar skulu eisini hava fleiri og betri tilboð um eftirútbúgving.

Pensionistarnir eru ikki allir líka væl fyri peningaliga. Ein broyting má gerast, soleiðis at hvør einstakur persónur, ið er 67 ár fær somu sømdir sum øll onnur. Hugsast skal ikki um, hvørja inntøku hjúnarfelagin hevur, men bert um tann einstaka persónin.

Stakir uppihaldarar hava ikki øll eina inntøku, ið er høg nokk til at hesin bólkur klárar seg eins væl og onnur. Møguleikin fyri at útbúgva seg, eigur at vera tann sami fyri øll, men soleiðis er ikki. Har skúlarnir eru, ber ikki altíð til at fáa eitt stað at búgva og ofta er tað alt ov dýrt fyri ein stakan uppihaldara.

Sum javnaðarkvinna vil eg arbeiða fyri, at gera Føroyar til eitt enn betri vælferðarsamfelag.

# Rúmligi arbeiðsmarknaðurin - enn rúmligari



Val ✗

KRISTINA TOFTEGAARD LARSEN
Sjálvstýrisflokkurin

Fólk ið bera likamlig, sálarlig, sosial ella menningarlig brek, eru virðismiklir borgara í landinum, og skulu viðurkennast á jøvnum føti við onnur.

At hava eitt arbeiði hevur avgerandi týdning fyri at føla seg verdan sum samfelagsborgara, og hevur somuleiðis positivt árin og fyribyrgir einsemi og dapurskygni, ið ofta hava nógvar fylgjur við sær.

Øll fólk hava tørv á einum innihaldsríkum gerandisdegi, eisini fólk ið bera brek. Mong av teimum hava ein óbrúktan førleika at bjóða arbeiðsmarknaðinum. Fólk, ið bera brek, eru eisini eitt tilfengi og mong eru tey, ið ynskja/bíða eftir at fáa møguleika at skapa av sær í samfelagnum. Stovnar og fyritøkur eiga at víðka og tillaga arbeiðsumstøðurnar til eisini at rúma fólki ið bera brek.

Vit eiga at gera eitt miðvíst arbeiði fyri, at halda fólki á arbeiðsmarknaðinum og fyri at fáa so nógv fólk sum gjørligt, at gerast vinnuliga virkin á arbeiðsmarknaðinum.

Sjálvstýrisflokkurin vil hava ein arbeiðsmarkna fyri øll.

# Sjálvberandi búskapur



Val ✗

HEÐIN ZACHARIASEN
Landsstýrismaður valevni fyri Fólkaflokkin

Fólkaflokkurin fer framhaldandi at arbeiða fyri einum sjálvberandi búskapi. Hetta skal gerast á tann hátt, at vit tryggja at rakstrarútreiðslurnar verða hildnar á einum forsvarligum støði. Rakstrarútreiðslurnar skulu leggjast soleiðis til rættis, at tær eru tálmandi og ikki stimbrandi, ein sunnur búskapur er sunnur, um vit politikarar klára at halda rakstrarútreiðslunum niðri, og tað eigur og má vera málið. Hetta er ikki ein løtt uppgáva, tað er ein sera krevjandi uppgáva at klára at halda útreiðslunum niðri, og er hetta galdandi fyri bæði land og kommunur. Sjálvsagt tá ið nýggjar uppgávur koma og verða settar í verk, hevur hetta sjálvandi rakstrarútreiðslur við sær, og tá er eisini talan um eina tænastu, sum verður givin borgarunum.

Íløgur er ein postur, sum er stimbrandi á so nógvar mátar fyri land og kommunur. Hesin postur er eisini nógvar ferðir lættari at umsita, grundað á, at um inntøkurnar eru minkandi so er væl lættari at minka íløgurnar, tí hetta oftast ikki hevur við sær, at starvsfólk, ið eru í føstum starvi, skulu sigast úr starvi. Tá ið tað er sagt, vil eg eisini siga, at tá ið íløgur verða gjørdar, vera nýggj aktiv gjørd, tað kann vera skúlar, dagstovnar, ítróttaøki, vegir, o.s.v. tað verið seg hjá landi og kommunum, og sum eisini kunnu hava rakstrarútreiðslur við sær, sum so eisini kann verða ein nýggj tænasta hjá borgarunum.

Avbjóðingin hjá lands- og kommunupolitikarum er, at klára at halda ein ávísan part av eini fíggjarætlan til íløgur, verður tað gjørt, er tað eftir míni metan eitt tekin um ein væl riknan fíggjarpolitikk.

# Vinnan skríggjar



Val ✗

AKSEL V. JOHANNESEN
Javnaðarflokkurin

Javnaðarflokkurin vil framhaldandi útbyggja vælferðina! Vit eru fullvæl greið yvir, at hetta ikki er ókeypis. Tí er framhaldandi neyðugt at skapa framburð og búskaparvøkstur. Javnaðarflokkurin vil skapa vøkstur við einum dynamiskum vinnulívi, einum høgum útbúgvingarstøði og við góðum vælferðarskipanum. Størsta hóttanin her og nú í móti framhaldandi búskaparvøkstri er tó vantandi arbeiðsmegi.

Tí er neyðugt, at vit skjótast gjørligt fáa broytt útlendingalógina, so tað gerst lættari og smidligari at fáa útlendska arbeiðsmegi hendan vegin. Hetta er eitt avgerandi stig, um okkara vinna framhaldandi skal framleiða við fullari orku. Spurningurin er tó, um vit einans skulu dúva uppá útlendingin.

Mítt svar er nei! Ein avleiðing av stóra tørvinum á arbeiðsmegi er, at stórur prísvøkstur er at hóma alla staðni í samfelagnum – serliga innan byggivinnuna. Samstundis sum fleiri vinnur hava tørv á arbeiðsmegi, hava vit eina skipan við uttanlandsfrádrátti, ið beinleiðis hevur sum endamál at eggja føroyingum at fara uttanlands at arbeiða. Henda skipan eigur at verða endurskoðað, tí sum støðan í samfelagnum er í dag, ger okkara arbeiðsmegi uttanlands størst nyttu heima í Føroyum.

Somuleiðis eru nógvir føroyingar búsitandi uttanlands, og ofta er talan um fólk við høgari útbúgving. Skulu vit útbyggja og menna land okkara, er neyðugt at fáa hesar føroyingar heim til Føroya at búgva og virka. Hetta verður m.a. gjørt við góðum vælferðarskipanum. Okkara vælferðarskipanir eru á lægri støði enn í grannalondunum. Tí tapa vit kappingina um týdningarmesta tilfeingið av øllum - menniskjatilfeingið. Javnaðarflokkurin hevur ein valskrá, ið lyftir okkara vælferðarskipanir upp á støði við tær hjá grannalondunum. Vælferðartænastur koma okkum øllum til góðar, og samstundis kunnu tær vera við til at fáa vælútbúnar føroyingar heim aftur á klettarnar at virka. Tískil eru vælferðarskipanir ein av grundarsteinunum undir framhaldandi búskaparvøkstri og framburði.

**Gott val!**

# Hvat verður betri, tá fólkaskúlin er lagdur út á kommunurnar?



Val ✗

MIKKJAL SØRENSEN
Javnaðarflokkurin

Fyrst í desember kom yvirlýsing frá Kommunusamskipan Føroya, har heitt varð á politisku flokkarnar um at taka upp samráðingar eftir valið við tí endamáli, at leggja fólkaskúlan út til kommunurnar at umsita.

Tað er ikki nýtt, at framstandandi politikarar úr ymsum flokkum, ganga hart innfyri at leggja fólkaskúlan út á kommunurnar, og til hetta valið vera tað óivað fleiri, sum fara uppí tað kórið.

**Tað verður m. a. ført fram, at:**

vit skulu hava sjey kommuneindir

vit skulu hava greiðari býti millum land og kommunur

vit skulu hava útjavningarskipan.

Alt gott um hetta, tí tað verður neyðugt at fremja omanfyri nevnda.

Tað verður eisini ført fram, at verandi skúlaskipan haltar í ólukkumát, og einasti máti at betra fólkaskúlan, er ein útlegging til kommunurnar.

Hesum taki eg als ikki undir við. Um so er, at verandi skipan ikki er nóg góð, er tað einki sum talar fyri, at tað kemur at virka betur undir kommunum.

Fólkaskúlin er ryggurin undir okkara samfelag. Hann skal nú "syndrast" og brúkast sum "eksperiment", at leggja málsøkir út á kommunur. Hetta er langt úti.

Fólkaskúlin kostar pening, og øll vita, at kommunur raðfesta ymiskt, og fara at raðfesta ymiskt, og so verður eisini her.T.v.s. at næmingar vera ymiskt fyri, alt eftir hvørji kommunu teir búgva í.

Javnaðarflokkurin hevur altíð lagt, og leggur enn, alstóran týdning í útbúgving, og at øll skulu hava møguleika at fáa sær eina útbúgvig..

Fólkaskúlin, og útbúgving sum heild, eru eitt av mínum hjartamálum.

Vit hava ein góðan fólkaskúla, og hann skal mennast og betrast og framvegis liggja undir mentamálaráðnum.